


Mynd: Álvur Haraldsen

# FM-vónin hjá Víkingi sløknaði

**VODAFONEDEILDIN** Eysturoyaruppgerðin millum B68 og Víking gjørdist ein linlig uppgerð, har toftamenn tó høvdu munin, og vunnu at enda 2-0. Úrslitið hevur við sær at FM vónin hjá Víkingi er við at hvørva í havsbrúnni

Ólavur Øre Hansen

| | |
|---|---|
| B68 | 2 |
| Víkingur | 0 |

Hóast B68 ikki hevur havt eitt gott kappingarár, so hava teir staðið seg væl á heimavølli, har teir hava givið fleiri av betru liðunum skarpan gang, og hetta fekk Víkingur at sanna sunnudagin, tá teir taptu 2-0 á Svangaskarði.

Úrslitið ber við sær at toftamenn leggja fjarstøðu niður til botnliðini, og hava so gott sum, tryggjað sær sætið í Vodafonedeildini komandi ár, meðan FM vónin hjá Víkingi fekk eitt skot fyri bógvin, og sær út til at hvørva í havsbrúnni.

### Uppiborin sigur

Venjarin hjá B68, Bill Mc Jacobsen var væl nøgdur við avrikið hjá hansara liði, og tey trý stigini.

– Vit vistu at talan fór at vera um ein truplan dysti, tí Víkingur hevur staðið seg væl í síðstuni. Men samanumtikið haldi eg at vit vóru betra liðið, og vunnu at enda ein uppibornan 2-0 sigur á Víkingi, segði Bill Mc Jacobsen eftir dystin.

B68 venjarin hevur grein í sínum máli, tí B68 var betra liðið. Ikki tí teir spældu so væl, men heldur vóru tað gestirnir, sum als ikki fingu glið á egið spæl. Serliga var saknurin í Nenad á miðvøllinum eygsýndur, tí Víkingur hevði sera trupult í skipaða álopsspælinum, og av tí sama var langt millum vandastøðurnar frammanfyri B68 málinum.

## *Viðmerkingar í 3. Hálvleiki:*

- *Aftaná tapið ímóti B68 syngja teir í Víkingi, »Eg tími ikki at spæla við meir«.*
- *Góðir, góðir, góðir. Eg elski mítt B68.*
- *Á Toftum dámar mær betri í NAVIA enn á Svangaskarði. Í NAVIA fái eg meira fyri pengarnar.*
- *Nykurin krøkti halan um víkingin og hann dovnaði.*

### Keita legði fyri

Toftamenn fingu ein dreymabyrjan uppá dystin, tá Keita longu í fimta minutti legði B68 á odda, eftir at hann stríddi seg framvið fleiri mótspælarum og setti bóltin í netið.

Leiðslumálið hevði við sær at Víkingur skuldi fram á vøllin, men teir høvdu sera trupult við at koma til kjansir. Tað manglaði bæði hugflog og tempo yvir spælinum hjá Víkingi, og tískil hevði B68 ikki stórvegis trupulleikar at avvísa víkingum.

Eitt korter inn í seinra hálvleik, gjørdist mótbrekkan hjá felagsliðnum úr Gøtu og Leirvík enn brattari, tá Pól Jóhannus Justinussen, eftir hornaspark, otærnaður kundi stútaði bóltin í kassan.

Hóast Víkingur royndi at trýsta, og fram móti dystarenda kom fram til góðar kjansir, so fingu teir ikki bóltin fram við Vlada í B68 málinum.

Sostatt endaði eysturoyar uppgerðin við einum 2-0 sigri til B68, sum hevur so gott sum tryggjað sætið í Vodafonedeildini komandi ár, meðan Víkingur misti FM vónirnar á gólvið.

post@sosialurin.fo

## B68 fekk sjey stig

Toftamenn kunnu við gleði minnast aftur á teir tríggjar dystirnar móti Víkingi í hesum kappingarárinum. B68 fekk fult á heimavølli í tveimum dystum, og tað eydnaðist at fáa eitt stig á útivølli. Í fimta umfari spældi liðini ein minniligan dyst á Svangaskarði, sum endaði við 5-3 sigri til heimaliðið. Dysturin skifti eigara tríggjar ferðir. Fyrst kom B68 á odda 2-0, so kom Víkingur á odda 3-2, og so gjørdi B68 bart og vann 5-3. So veitslukent varð tað ikki, tá liðini hittust í 14. umfari. Tá deildu liðini stigini í einum málleysum dysti. Í gjár vann B68 aftur á Víkingi við tveimum málum, og muna hesi sjeyt stigini móti Víkingi væl hjá toftamonnum á stigatalvuni. *- heri*

## Jóhan Dávur Højgaard:
## – Betra liðið vann

– Eg haldi at vit vóru betri enn Víkingur í dag, har vit standa væl í verjupartinum, og eru vandamiklir í mótálopunum, segði Jóhan Dávur Højgaard eftir dystin.

– Vit fáa eitt mál tíðliga í dystinum, og tí skuldi Víkingur fram á vøllin, og tað passaði okkum sera væl. Hetta tí Víkingur hevði stórar trupulleikar við álopsspælinum, meðan vit kundu satsa uppá mótálop, segði miðverjin hjá toftamonnum.

Spurdur hvat úrslitið hevur at siga fyri B68, metir Jóhan Dávur, at talan var um ein týdningarmiklan sigur, tí tað ráddi um hjá teimum, fyrst og fremst, at tryggja sær sætið í Vodafonedeildini komandi ár.

*- ólavur*